TÓRSHAVNAR KOMMUNA

UNDANGÓÐKENNING

# Heildarætlan/masterplan fyri økið við Stórutjørn



## ÚTBJÓÐINGARSKRIV

Útbjóðingarskriv

22.11.2019
J. nr. 18/03468

# Heildarætlan/masterplan fyri økið við Stórutjørn

Tórshavnar kommuna bjóðar við hesum til luttøku í undangóðkenningini til kappingina um heildarætlan/masterplan fyri økið við Stórutjørn.

Seinastu árini hevur fólkavøksturin í Føroyum verið stórur, uml. 1,5% um árið, og merkist fólkavøksturin serliga í høvuðsstaðarøkinum. Ein alsamt vaksandi býur krevur rúmariræsur at liva og virka í, tí er tørvur á at víðka um býin. Í hesum sambandi verður nú farið undir arbeiðið at skipa Stórutjørn í Hoyvík, økið norðanfyri Klingruna og vestanfyri býlingin Inni á Gøtu.

Í kommunuætlanini hjá Tórshavnar kommunu er Stóratjørn eitt av teimum økjunum, ið mett verður at hóska seg væl til býarvøkstur. Lendisviðurskiftini, staðsetingin í mun til infrakervið og bústaðardepil, íløgur í undirstøðukervið o.a. tala fyri, at Stóratjørn verður tann næsti býarparturin, ið farið verður undir at skipa.

Freist at lata inn umsókn um undangóðkenning er 13. des. 2019 og upp til 5 umsøkjarar sleppa víðari til kappingina um bestu heildarætlan fyri Stórutjørn.

Kappingin snýr seg um at finna besta uppskotið til eina heildarætlan fyri, hvussu blandað bústaðar- og miðstaðarbygging, t.e. handlar, stovnar, heilsubótarhøli og annað virksemi, ið hoyrir dagliggdegnum til, skal skipast í økinum. Hetta fyri at stuðla undir einum sosialum-, umhvørvisliga- og fíggjarliga burðardyggum samfelagi. Av nágreiniligum virksemi, sum er samtykt at staðseta við Stórutjørn, er ein stórhøll, ið skal kunna hýsa viðkomandi ítróttargreinum, umframt stórum ráðstevnum, tónleikaframførslum og øðrum.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu stendur fyri dømingini av innkomnum umsóknum um undangóðkenning. Fyrispurningar um undangóðkenningina kunnu sendast til Rakul Vest Højgaard, á rakulvesth@torshavn.fo. Freistin at seta spurningar til undangóðkenningina er 9. desember 2019, og verða spurningar svaraðir gjøgnum teldupost. Freistin at søkja um undangóðkenning er 13. desember 2019 kl. 13.

Annika Olsen
Borgarstjóri

Marin Katrina Frýdal
Forkvinna í Byggi- og býarskipanarnevndini

# 1.0 Inngangur

Tað samlaða útbjóðingartilfarið fevnir um hetta skjalið og fylgiskjøl:

- Fylgiskjal_01 Skjal til undangóðkenning
- Fylgiskjal_02 Stóratjørn – kapping um heildarætlan/masterplan

"Fylgiskjal_02 Stóratjørn – kapping um heildarætlan/masterplan", er kappingarskráin, ið lýsir uppgávuna, ið undangóðkendir umsøkjarar skulu loysa. Kappingarskráin, ið er viðheft í undangóðkenningini er eitt fyribils upprit, og kunnu broytingar gerast í henni, inntil 20. desember 2019, tá úrvaldir umsøkjarar verða kunngjørdir.

## 1.1 Verkevni

Avmarkaða lendið, ið Tórshavnar kommuna hevur tøkt, skal verða karmur um ymisháttaða bygging. Ynskið er at vaksa um fjølbroytni av bústaðarsløgum, soleiðis at tað ikki bert eru tey 500 m2 stóru grundstykkini, ið fara at mynda livimynstrið í nýggja býarpartinum. Hetta skal vera við til at skapa eina fjølbroytta fólkasamanseting í býnum, umframt at fleiri borgarar í kommununi verða tryggjaðir ein bústað.
Ynski er at fáa ein vælvirkandi býarpart við blandaðum bústøðum við nærleika til gerandis hentleikar og grøn øki, ið eru við til at tryggja ein burðardyggan og livandi býarpart – allan dagin, alt árið.
Trivnaðurin skal vera í hásæti, tí skal bygging í økinum tillagast til støddarlutfall, nærumhvørvi og lívið millum bygningarnar, samstundis sum hugsast skal um neyðuga tættleikan, ið skal til fyri at gagnnýta avmarkaða lendið á bestan hátt.
Serlig eyðkenni eru í økinum, og eiga hesi í ávísan mun at verða varðveitt fyri at skapa ein sterkan samleika fyri økið, og borgararnar, ið har skulu búgva og virka.
Tórshavnar kommuna hevur sum mál at hava umhvørvið við í øllum sínum virksemi, og sum ein liður í skipanini av infrakervinum skulu viðurskifti fyri bleytu ferðsluni raðfestast frammarlaga. Eitt samanhangandi vega- og gøtukervi í økinum skal eggja fólki til at ganga súkkla og at nýta almennu ferðsluna.

## 2.0 Fortreytir

### 2.1 Økið

Heildarætlanin skal fevna um matr. nr. 1æf og 135ed, Hoyvík. Økið er tilsamans uml. 52 ha til støddar og liggur millum Klingruna fyri sunnan, vinnuøkið á Hjalla fyri norðan, býlingin Inni á Gøtu fyri eystan og haga fyri vestan. Økið liggur í størstan mun sum hagi, tó so, at økið í landsynningspartinum er skipað sum kirkjugarður.



# 3.0 Útbjóðingartreytir

### 3.1 Treytir til umsøkjarar í undangóðkenningini

Í undangóðkenningini er metingin av umsøkjarunum grundað á niðanfyristandandi punktir. Umsøkjarar skulu fylla út og senda fylgiskjal_01 “Skjal til undangóðkenning”, til torshavn@torshavn.fo við viðmerking “Undangóðkenning Stóratjørn” í seinasta lagi 13. desember 2019. Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu ger metingina.

### 3.2 Førleikar

Umsøkjari skal kunna leggja fram skjalprógv fyri, at hesin megnar at fullfíggja uppgávuna. Hetta merkir, at umsøkjarin skal vísa á neyðugar fakligar førleikar, t.d. við manning, útgerð og tilvísingum til aðrar størri verkætlanir. Umsitingin í Tórshavnar kommunu undangóðkennir teir umsøkjarar, sum verða mettir at vera best skikkaðir til at loysa uppgávuna. Upp til 5 umsøkjarar verða undangóðkendir. Eftir innlatna umsókn, kann Tórshavnar kommuna krevja fleiri upplýsingar frá umsøkjaranum og kann avlýsa útboðið, um eingin verður mettur skikkaður.

Samlaða upphæddin hjá dómsnevndini at ráða yvir til virðislønir og møguligt keyp av uppskotum er kr. 800.000, og ger dómsnevndin eina meting av, hvussu hesar skulu býtast, eftir at dømingin er farin fram. Tó eru allir umsøkjarar, ið koma víðari í undangóðkenningini og sum lata inn kravt tilfar, tryggjaðir minst kr. 50.000 hvør.

# 4.0 Formligar treytir

## 4.1 Tíðarætlan

- **2. des. 2019** Kunngerð á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu.
- **13. des. 2019** Freist at søkja um undangóðkenning.
- **20. des. 2019** Kunngerð av úrvaldum umsøkjarum og endaligari kappingarskrá.
- **24. jan. 2020** Freist at seta fram spurningar.
- **31. jan. 2020** Tórshavnar kommuna svarar spurningum.
- **23. mar. 2020** Freist at lata inn uppskot til heildarætlan.
- **30. mar. – 3. Apríl 2020** Vinnandi uppskot verður funnið.
- **XX. apríl 2020** Kunngerð av vinnandi uppskoti.

## 4.2 Dómsnevnd

Undangóðkenning
Umsóknir um undangóðkenning verða viðgjørdar av umsitingini hjá Tórshavnar kommunu.

Kapping um heildarætlan
Innkomnu uppskotini verða viðgjød av dómsnenvd, ið er soleiðis mannað:

- Borgarstjórin
- Formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini
- Tekniski stjórin
- Býararkitekturin
- Útlendskur fakdómari
- Føroyskur fakdómari

Dómsnevndin hevur møguleika at heita á aðrar ráðgevar í sambandi við dømingina. Hesir eru tó bert vegleiðandi. Skrivari hjá dómsnevndini er Rakul Vest Højgaard, Býarskipanardeildin hjá Tórshavnar kommunu: rakulvesth@torshavn.fo.

## 4.3 Merking og innlating av umsóknum til undangóðkenning

Umsøkjarar skulu fylla út "Fylgiksjal_01 skjal til undangóðkenning".

Umsóknirnar skulu latast inn á staðnum ella sendast við posti ella sendiboði, og vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 13. des. 2019 kl. 13.

Uppskotini verða send ella latin til:
Tórshavnar kommuna
Postmoga 32
FO-110 Tórshavnar kommuna
Avgreiðsla : Snarskivan, Vaglið
Avgreiðslutíðir Mánadag til fríggjadag kl. 9.00-16.00, fríggjadag kl. 9.00-15.00

Umsóknin skal frámerkjast "Stóratjørn – undangóðkenning".

# Fylgiskjal_01 Skal til undangóðkenning

### Treyt til tín sum umsøkjari

Fyri at luttaka í undangóðkenningini, skal tú fylla hetta oyðublaðið út, legjja viðkomandi dokumentatión við og vátta, at upplýsingarnar eru rættar.

### Toymi

Greið frá, hvussu toymið er skipað, hvør er við í toyminum og hvønn leiklut tey ymsu hava í verkætlanini. Tað er týdningarmikið, at toymið er fullfíggjað.

### Førleikar

Greið frá tykkara fakligu førleikum til at loysa uppgávuna, eftir treytunum í kappingarskránni. So sum manning, útgerð og tilvísingar.

Stað:______________________________ Tann:____________________________________

Navn:______________________________ Undirskrift:____________________________

NOVEMBER 2019

**Tórshavnar kommuna**
Postsmoga 32 · FO-110 Tórshavn
Telefon 302010 · torshavn@torshavn.fo

Mánadag-hósdag kl. 9-16
Fríggjadag kl. 9-15



www.torshavn.fo